# Innangarðsútskifting
# í
# Depli
# fyri Norðan



av Enninum. pol.fo

Pag. 3089 **Hósdagin 8. juni 2006 kl. 10.00 varð útskiftingarfundur settur í gamla skúla í Hvannasundi at viðgera mál um innangarðsútskifting av Depli fyri Norðan.**

Fram varð lagt:

Skjal nr. 1: Lýsing í Dimmalætting og Sosialinum 7. og 10. mars 2006, og lýsing í kunngerðatalvuni, og í Dimmalætting og Sosialinum 27 mai.

Uppá fyrispurning, um nakar hevði viðmerkingar til lýsingina ella lýsingarháttin, svaraði eingin.

Formaðurin lýsti síðani fundin lógliga lýstan og settan.

Skjal nr. 2: Grannastevnuviðtøkan frá 7. mars 2005 við tilhoyrandi skjølum og góðkend av Búnaðarstovuni 30. juni 2005.

Skjal nr. 3: Skriv frá Vinnumálastýrinum, dagfest 6. juli 2005, har Øssur Á. Midjord er uppnevndur til útskiftingarformann.

Skjal nr. 4: Útskrift úr rættarbókini, 8. september 2005, har Olaf í Garði Joensen, Eiði, og Maria Gregersen við Matará, Syðrugøta, verða uppnevnd til nevndarlimir.

Pag. 3090 Víst varð til § 10, har útskiftingarkravið kann takast aftur, um øll, sum atkvøddu fyri útskifting á grannastevnu, ynskja tað. Eigararnir ynsktu útskifting.

Habiliteturin varð viðgjørdur. Nevndarlimirnir vita seg ikki vera so nær skyldar ella svágdar við nakran ognara, at tað nemur teirra habilitet.

Eingin hevði viðmerkingar til habilitetin, og er nevndin skipað soleiðis:

Øssur Midjord, matrikulstjóri, formaður

Maria Gregersen, nevndarlimur

Olaf í Garði Joensen, nevndarlimur

Sambært § 5, stk. 2, undirskrivar nevndin soljóðandi váttan:

"At eg vil leggja mær eina við og óheftur útinna tær skyldur, sum liggja á mær sum útskiftingar-nevndarlimi, tað vátti eg við hond míni undir trúnaðartreytum".

*Øssur Midjord* *Maria Gregersen* *Olaf í Garði Joensen*

20 eigarar vóru møttir.

Frá Matrikulstovuni møtti Jógvan R. Frýdal og Arnold Thomassen.

Pag. 3091 Formaðurin greiddi frá mannagongdini undir útskifting og legði dent á, hvussu umráðandi tað er, at góðskumetingin er í samsvar við brúkið. Eisini var greitt frá, hvussu kostnaðurin verður býttur millum landskassan og eigararnar.

Tosað varð um fyrimun og vansar við útskifting. Útskiftingarøkið er í bygdaplaninum útlagt til byggilendi til sethús og alment endamál.

Fundurin bleiv slitin í 15 min., meðan nevndin viðgjørdi útskiftingarkravið.
Syðri partur av økinum er gamal bøur og eldri velt gerðir, meðan norðari partur er innlegg frá 1937 og bert partvíst velt. Fyri framtíðina vil tað vera ein fyrimunur, um jørðin verður samlað við atlitið til bygdarplanin.

**Nevndin ásetur, at innangarðsútskifting av Depli fyri Norðan verður at fremja.**

Tosað varð um góðskumetingina. Ongin vildi uppnevnast at hjálpa nevndini við góðskumetingini, men fundarfólkið gav nevndini ábendingar um, hvussu góðskan var sunnan fyri og norðan fyri landsvegin. Best í gamla markatalsbønum, og vánaligast í tí óvelta norðanfyri.

Fundurin lokin.

Pag. 3091 Eftir matarsteðg varð farið undir at góðskumeta. Nevndin var samd um, at gamli bøurin var av eins góðsku, og mettur til 80%. Við atliti til bygdarplanin varð lægsta met sett til 20%, tá lendi, sum er vánaligt til jarðarbrúk kann nýtast til bygging í framtíðini.

Metingin varð endað.

**Fundur við kommununa.**
Ár 2013 mikudagin 25. september var fundur á kommunuskrivstovuni í Hvannasundi.

Fyri bygdaráðið møttu Katrin Næs, bygdaráðsformaður, Sunneva Ludvig, kommunuskrivari og Sverri Michalsen, ráðgevi.

Petur Nielsen, útskiftingarformaður, greiddi frá, at nú er ætlanin at taka arbeiðið við innangarðs-útskiftingini í Depli uppaftur.

Undir eini útskifting hevur kommunan rætt til at ogna sær lendi til vegbreiðkan, grundstykkir og annað.

Tosað varð um henda møguleikan, og kommunan fer at hyggja nærri at hesum i næstum.

**Hósdagin 31. oktober 2013 kl. 19.00 varð fundur settur í skúlanum á Fossanesi.**

Møttir vóru um 20 eigarar.

Nevndin var fullmannað, og fyri Umhvørvisstovuna møttu Óli Johansen og Súni Mittún.

Formaðurin bjóðaði fundarfólkinum vælkomnum, og nú so rúm tíð er runnin, síðani fyrsti útskiftingarfundur var, hugleiddi hann eitt sindur um, hvat ein útskifting er, og hvussu arbeiðið verður skipað. Síðani varð farið til tann formliga partin av fundinum.

Framlagt varð:

Skjal nr. 5: Lýsingar, ið staðið hava í Sosialinum nr. 117 og 119 frá 11. og 16. oktober 2013, á heimasíðuni og somuleiðis í kunngerðatalvuni.

Formaðurin spurdi, um nakar mótmælti lýsingarháttinum og setanini av fundinum.

Eingin mótmælti, og fundurin varð tí lógliga lýstur og settur.

Skjal nr. 6: Skriv frá Innlendismálaráðnum, dagf. 23. august 2007, har Arnold Thomassen verður útnevndur til formann.

Skjal nr. 7: Skriv frá Innlendismálaráðnum, dagf. 28. januar 2009, har Petur Nielsen verður útnevndur til formann.

Formaðurin las gerðabókina. Avrit av gerðabókini er á heimasíðu Umhvørvisstovunar (www.us.fo), har eisini skjølini v.m., ið hoyra útskiftingarmálinum til, eru tøk.

Broytt eigaraviðurskifti gera, at nevndarlimurin Maria Gregersen nú heldur seg vera ógegniga og hevur tí sagt nevndarsessin frá sær. Í hennara stað er 1. varalimur, Rasmus Skorheim, komin í nevndina.

Fram varð lagt:

Skjal nr. 8: Góðskumeting av jørðini saman við eigaralistum.

Tilfarið liggur frammi á kommunuskrivstovuni og á Umhvørvisstovuni. Tað er tøkt á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni (www.us.fo) og á www.kortal.fo.

Góðskumetingin (metta víddin) av hvørjum einstøkum eigindómi er grundarlagið undir planinum og sum so avgerandi fyri endaliga úrslitið.

Viðmerkingar viðvíkjandi metingini skulu vera kunnaðar nevndini fyri 1. desember 2013. Tær skulu stílast til útskiftingarnevndina fyri Depil og sendast Umhvørvisstovuni, Postboks 2048, 165 Argir, ella umvegis teldupost á us@us.fo.

Nevndin tekur skjótast gjørligt støðu til møguligar viðmerkingar, og góðskumetingin verður síðani latin til ákæru.

Møgulig kæra skal sendast Yvirútskiftingarnevndini við Sorinskrivaranum, C. Pløyensgøta 1, postboks 28, 110 Tórshavn. Hetta verður kunngjørt, og kærufreistin, sum er 3 mánaðir, verður ásett.

**Ynski**

Tá góðskumetingin er staðfest, verður farið undir at gera fyribilsplan, uppskot til skiftiplan, og eigararnir hava tí møguleika at siga nevndini, hvar teir ynskja jørð sína lagda út.

Á fundinum varð lagdur dentur á, at tað hevur stóran týdning, at eigararnir brúka henda rættin at hava ávirkan á, hvussu eigindómsskipanin í Depli fyri Norðan, skal vera eftir skiftið.

Tá lýst verður við kærufreistini fyri góðskumetingina, verður samstundis kunngjørd ein evsta freist, nær eigarar kunnu gera útskiftingarnevndina variga við ynski síni.

**Garðskylda**

Eftir § 33 í útskiftingarlógini skal nevndin taka støðu til garðskylduna og býtið av gørðunum í sambandi við útskiftingina. Formaðurin spurdi fundarfólkið, hvussu hesi viðurskifti eru skipaði.

Upplýst varð, at bøurin er vetrarfriðaður, og at kommunan hevur átikið sær garðskylduna.

**Ognartøka**

Í sambandi við útskiftingina hevur tað almenna møguleika at fáa til vega lendi til almenn endamál við ognartøku sambært §22 í útskiftingarlógini. Útskiftingarnevndin samskiftir tí við kommunu og Landsverk um teirra lendistørv og avgerðir, tá útskiftingarætlanin verður gjørd.

Eigarar kunnu ynskja at fáa útgoldið endurgjaldið fyri ognartøkuna, ella tað kann verða tikið av felanum, tvs. allari jørðini, áðrenn býtt verður.

Fundurin endaði um 21-tíðina, og fundarfólkið støðaðist eina góða løtu eftir fundin at hyggja at kortunum og tosa um jarðarviðurskiftini yvirhøvur.

*Petur Nielsen* *Olaf í Garði Joensen* *Rasmus Skorheim*

**Viðgerð av kæru um góðskumeting**

Hópin av ynskjum eru handaði nevndini viðvíkjandi, hvar eigarar ynskja jørð sína lagda, tá farið verður undir at gera útskiftingarætlan, men bert ein kæra er sett fram viðvíkjandi góðskumetingini.

Málið er kannað á staðnum, og útskiftingarnevndin hevur samskift um kæruna umvegis teldupost. Niðurstøðan er, at metingin av matr.nr. 63f verður broytt til 35% fyri velta partin av stykkinum.

Kort og eigaralistar verða dagførd samsvarandi, og við kunngerð í bløðunum verður góðskumetingin latin til ákæru. Kærufreistin er 3 mánaðir frá fyrsta kunngerðadegi. Sí skjal nr. 9 - kunngerð.

Eftir umskipanir á Umhvørvisstovuni er Petur Nielsen loystur frá sum formaður fyri útskiftingina av Depil fyri Norðan. Í skrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum dagf. 1. des. 2019 er Arnold Thomassen tilnevndur formaður í útskiftingarnevndini fyri Depil fyri Norðan. Sí skjal nr. 11.

**Fundur við Landsverk**
Mikumorgunin 5. mai 2021 var fundur settur á Umhvørvisstovuni.

Fyri Landsverk møttu Marin Katrina Frýdal og Boði Haraldsson. Jógvan R. Frýdal møtti frá Umhvørvisstovuni og Arnold Thomassen, útskiftingarformaður.

Umboðini frá Landsverk mettu ikki at neyðugt var at ogna sær lendi í samband við útskiftingina.

**Fundur við kommununa.**
Hósmorgunin 6. mai 2021 var fundur á kommunuskrivstovuni í Hvannasundi.

Fyri bygdaráðið møttu Katrin Næs, bygdaráðsformaður og Beinta Lind Sørensen, kommunuskrivari. Jógvan R. Frýdal møtti frá Umhvørvisstovuni. Útskiftingarnevndin var umboðað av Arnold Thomassen, form.

Greitt var frá, at nú verður arbeiðið við innangarðsútskiftingini í Depli tikið uppaftur, og undir eini útskifting hevur kommunan rætt til at ogna sær lendi til vegbreiðkan, grundstykkir og annað.

Tosað var millum annað um vegin gjøgnum bygdina. Avtalað varð, at Umhvørvisstovan skuldi máta vegin upp, so ein betri mynd fæst av honum.

Kommunan fer í næstum at viðgera spurningin um at ogna sær lendi í samband við útskiftingina.

**Útskiftingarfundur var settur í skúlanum á Fossanesi 16. Juni kl. 1900**

Nevndin møtti fullmannað: Olaf í Garði Joensen, Rasmus Skorheim og Arnold Thomassen, form., og fyri Umhvørvisstovuna møtti Jógvan R. Frýdal.

15 eigarar vóru møttir á fundi.

Formaðurin byrjaði við at biðja vælkomin. “Tredie gang er lykkens gang” og nú fara vit enn einaferð undir at fáa framt innangarðsútskiftingina.

Skjal nr. 10 - Lýsing løgd fram. Spurt var um lýsing og lýsingarhátt og ongin mótmælti. Formaðurin lýsti fundin lógliga lýstan og settan.

So var skjal nr. 11 - Uppnevning av formanni lagt fram, og gerðabókin var lisin.

Spurt var um útskiftingarkravið ikki var fyrnað, nú so rúm tíð var liðin síðan.

Áðrenn útskiftingarnevndin tekur støðu til, um útskiftingin skal fremjast ella ei, kunnu allir eigarar, sum atkvøddu fyri, taka útskiftingarkravið aftur sbrt. útskiftingarlógini §10 2. stk. Tað er ikki gjørt í hesum føri, og tí verður kravið latið til útskiftinarnevndina at taka støðu til. Nevndin gjørdi av at fremja skiftið. E.A. Bjørk hevur eisini viðgjørt hetta í Færøsk bygderet s. 254-255 undir “ad. 8 begæring må ikke tilbagekaldes”. Bjørk letur heldur ongan iva vera um, at tá nevndin hevur tikið støðu vendist ikki aftur.

Ongin ivi er um, at her eru fundarfólkini ikki samd. Eigarar umboðandi niðursetubygdina eru hart ímóti útskiftingini og ynskja, at alt er óbroytt. Roynt var at greiða frá, at í framtíðini vildi tað lætta um, um útskift var, men vónleyst tyktist at koma fram við boðskapinum. Útskiftingin er og verður av tí ónda.

Osvald Sivertsen hevði eina søguliga gjøgnumgongd av Depli fyri Norðan frá fornari tíð til niðursetufólkið kom til Depil fyri Norðan og Fossá, og innleggið millum niðursetubygdirnar. Hugaligt við søgufróðum fólki.

Eftir drúgt orðaskifti spurdi formaðurin, um øll, sum luttóku á fundinum, vóru ímóti útskiftingini. Tá sást, at mælskast vóru mótstøðufólkini, meðan aðrir eigarar vóru fyri at fáa útskift.

Av tí, at so rúm tíð er liðin, síðan eigararnir høvdu sent inn ynski, bað formaðurin eigararnar um at senda ynski inn av nýggjum. Um onkur eigari ikki ynskti av nýggjum, verður gamla ynski viðgjørt saman við teimum nýliga innkomnu ynskjunum.

Ynskini skulu sendast til útskiftingarnevndina á us@us.fo og viðm. Depil fyri Norðan. Freistin at koma við ynskjum er 20. juli 2021.

Formaðurin takkaði fyri ein góðan og lívligan fund.

Fundurin var lokin kl. 20.30.

*Arnold Thomassen* *Olaf í Garði Joensen* *Rasmus Skorheim*

**Útskifting í nevndini.**
Seinast í november 2022 bórust boðini, at Rasmus Skorheim var farin um sýn.
Næsti eykalimur er Jytta Juul í Funningi, og heitt var á hana, um hon kundi taka yvir.

Eftir at hon hevði kannað eigaralistan, metti hon seg at vera gegniga og játtaði at taka við sum nevdnarlimur eftir Rasmus Skorheim.

**Útskiftingarnevndarfundur á Umhvørvisstovuni**

Tá klokkan var farin av 10  29. mars 2023 var nevndarfundur settur á Umhvørvisstovuni.
Nevndin  var fullmannað og fyri Umhvørvistovuna møtti Jógvan R. Frýdal.

Til umrøðu vóru innkomnu ynskini og gjøgnumgongd av fyrsta fyribilsplaninum.

Gerðabókin varð lisin.

Síðan vórðu ynski og fyribilsplanurin gjøgnumgingin.

Onkrar smávegis broytingar skuldu gerast, og semja var um at leggja fyribilsplanin fram á fundi á Fossánesi móti vári.

Um middagsleitið var fundurin lokin.

*Arnold Thomassen* *Olaf í Garði Joensen* *Jytta Juul*

**Útskiftingarfundur í skúlanum á Fossánesi 15. mai 2023**

Tá klokkan var loysnað av 19, setti formaðurin útskiftingarfundin.



Nevndin var fullmannað, og fyri Umhvørvisstovuna møtti Jógvan R. Frýdal.

Umleið 20 eigarar høvdu leitað sær norð á Fossánes á fund.

Skjal nr. 12 - kunngerð varð løgd fram.
Lýst var á heimasíðuni hjá Hvannasunds kommunu og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni.
Lýsingin var eisini send til Norðlýsið, men nevndin hevði ikki sæð lýsingina. Eitt fundarfólk nevndi, at lýsingin hevði staðið í Norðlýsinum.

Formaðurin spurdi um lýsing og lýsingarhátt, og ongin mótmælti. Fundurin var lógliga lýstur og settur.

Síðan seinasta fund á Fossánesi er Jytta Juul  komin í nevndina fyri Rasmus Skorheim.

Sum lýst var, vóru tvey punkt á skránni.

- Framløga av ognartøkuni
- Framløga av fyribilsplani

Lagt var fyri við ognartøkuni.
Greitt var í stuttum frá um ognartøku. Eisini var tosað um møguleikarnar at ognartaka eftir útskiftingarlógini §22, sum gevur kommununi rætt at ognartaka ávikavist 2 % av veltum bøi og 4 % av óveltum bøi.

Nevndin hevur í fleiri førum tosað við Hvannasunds kommunu um ognartøku og møguleikarnar, kommunan hevur at ognartaka í samband við innangarðsútskiftingina. Kommunan avgjørdi at brúka møguleikan at ognartaka.
Tað er ikki ókeypis at ognartaka. Sbrt. útskiftingarlógini §22 stk. 2, verður ognartikið av felanum, tað vil siga, at allir eigarar lata til ognartøkuna og fáa endurgjald fyri tað. Ognartiknað lendið verður við til at fíggja útskiftingina.



Eftir grein §22 stk. 4 kann eigarin velja at fáa endurgjald fyri sítt mista lendi og minkar samsvarandi í vídd. Velur eigarin at fáa endurgjald eftir grein 22.4, skal hetta boðast frá til nevndina á us@us.fo innan 12. juni 2023.

Fyri at meta um endurgjald í samband við ognartøku skal setast ein metingarnevnd. Vanligt er at uppnevna nevndarlimirnar til metingarfólk. Tá spurt var, um nakar hevði nakað ímóti, at heitt var á Sorinskrivaran um at uppnevna Olaf í Garði Joensen og Jyttu Juul, mótmælti ongin. Heitt verður tí á Sorinskrivaran at uppnevna Olaf og Jyttu til metingarfólk.



Síðan var skjal nr. 13 - ognartøka lagt fram.
Skjalið er tvíbýtt. Eitt kort sum vísir, hvat verður ognartikið, og ein uppgerð sum vísir, hvussu nógv verður ognartikið frá hvørjum.

Eftir var bara at leggja fyribilsplanin fram.
Áðrenn fyribilsplanurin varð avdúkaður varð greitt frá, hvussu planurin er evnaður til.

Á seinasta fundi bað formaðurin eigararnar koma við ynskjum um, hvar teir ynskja, ognin verður løgd. Nógv ynski vóru komin inn, og hesi vóru gjøgnumgingin. Áðrenn ynskini verða løgd út, eru møguliga nøkur mørk sum skulu rættast. Ognartøkan verður sett á kort, so greiða fæst á, hvat skal útskiftast. Á eini ogn matr.nr. 117 “dansistova”er ógreitt, hvør eigur. Undir matrikuleringini í 1983 var “Samkomuhúsið í Norðdepli” sett sum eigari, men hvør er tað? Nevndin er komin til tað niðurstøðu, at rættast er at seta Hvannasunds kommunu sum eigara. Á planinum er eitt stykki á uml. 15x15 lagt út til dansistovu. Spurt var, um nakar hevði nakað ímóti tí. Eingin mótmælti.

Nú nærkaðist hæddarpunktið á fundinum - framløga av fyribilsplaninum. Áðrenn formaðurin avdúkaði planin, legði hann eina við, at hann var gjørdur við bestu sannføring um so vítt møguligt at ganga ynskjunum á møti.

Greitt var síðan frá, hvussu fram verður farið eftir hendan fundin fyri at náa á mál. Ongin orsøk er at óttast fyri, at grannin fær nýsettu eplaveltuna, tí enn er nakað á mál.

Eigararnir hava møguleika at koma við viðmerkingum.

Viðmerkingar til ognartøkuna skulu sendast til Hvannasunds kommunu á hvannasund@hvannasund.fo
Viðmerkingar til fyribilsplanin skulu sendast til us@us.fo og viðmerkja Depil fyri Norðan

Seinasta freist at koma við viðmerkingum er **12. juni 2023.**

So rullaði Jógvan R. Frýdal fyribilsplanin fram, so fundarfólkið kundi síggja úrslitið og koma við sínum viðmerkingum og hugsanum.

Hvussu planurin var móttikin sigst best við at endurgeva orðini:
“Ongin ger øllum tilvildar”.

Tá klokkan var farin av 20.30 vóru seinastu fólkini farin, og fundurin var av.

*Arnold Thomassen* *Olaf í Garði Joensen* *Jytta Juul*

**Nevndarfundur um annar fyribilsplan**
Hósdagin 3. juli 2025 kl. 10.30 var nevndarfundur settur á Umhvørvisstovuni.

Nevndin var fullmannað.
Jógvan R. Frýdal og Brian Hansen umboðaðu Umhvørvisstovuna.

Innkomnu viðmerkingar til fyrsta fyribilsplan og uppskot til annan fyrlbilsplan skuldu viðgerast.

Formaðurin legði fyri at lesa gerðabókina.

Eftir at gerðabókin var lisin, var farið undir at gjøgnumganga innkomnu viðmerkingar til fyrsta fyribilsplan.

Eitt uppskot til annan fyribilplan var lagt fram og innkomnu viðmerkingarnar vóru samanhildnar við uppskotið.

Nevndin var samd um, at nakrar smávegis broytingar skuldu gerast við uppskotið, sum lá á borðinum, áðrenn tað kundi leggjast fram.

Avtalað var, at tá tær umrøddu rættingarnar vóru gjørdar, skuldi planurin sendast til nevndarlimirnar til góðkenningar, og eisini verður avtalað, nær næsti nevndarfundur skal vera.

*Olaf í Garði Joensen* *Jytta Juul* *Arnold Thomassen, fm*



**Framløga av øðrum fyribilsplani í skúlanum á Fossánesi 26. jan. 2026**
Sum kunngjørt varð fundurin settur kl. 19.

Nevndin var fullmannað:
Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna.




18 eigarar møttu á fundinum.

Skjal nr. 15 - Kunngerð varð løagd fram.
Lýst var á heimasíðunum hjá Norðlýsinum, Hvannasunds kommunu og Umhvørvisstovuni.



Formaðurin spurdi um lýsing og lýsingarhátt. Eingin tók orðið. Fundurin var lógliga lýstur og settur.

Gerðabókin var lisin.

Einasta punkt á skrá var framløga av øðrum fyribilsplani.

Áðrenn farið var undir framløgu av øðrum fyribilsplani varð stutt tikið saman um ognartøkuna.

So var lagt til brots við at leggja annan fyribilsplan fram. Tá freistin at koma við viðmerkingum til annan fyribilsplan var farin, hevði nevndin móttikið fýra viðmerkingar. Síðan eru tríggjar komnar afturat.



Onkur viðmerking varð gingin á møti, aðrar partvíst og okkurt er slept.

Greitt var síðan frá, hvussu annar fyribilsplanur og tilhoyrandi eigaralisti varð evnaður.

Skjal. nr. 16 - Annar fyribilsplanur og skjal nr. 17 - Eigaralisti vístur á skíggjanum.

Ein eigari setti spurningin um ikki bar til at vísa á broytingarnar millum fyrsta og annan fyribilsplan. Hetta verður tikið til eftirtektar til næsta fund.




So rullaðu Olaf, Jytta og Jógvan planirnar út á borðið, so lættari var at síggja, hvørja loysn nevndin nú var komin til.

Tá ein løta var gingin, tók formaðurin aftur orðið og greiddi frá at næsta stig varð, at eigararnir høvdu freist fram til **12. februar 2026** at koma við viðmerkingum til skjal. nr. 16 - annan fyribilsplan.

Eftir at freistin er farin, fer nevndin so at gjøgnumganga innkomnu viðmerkingar, og um ikki stórvegis broytingar vera, verður so ein endaligur planur gjørdur. Eisini skulu nevndarlimirnir meta um endurgjaldið í samband við ognartøkuna.

Tá klokkan nærkaðist 20, takkaði formaðurin fyri og sleit fundin.

*Olaf í Garði Joensen* *Jytta Juul* *Arnold Thomassen, fm*





